á Norðbúgvanum og Kvívíks Tummasi umborð á Stella Argus var farið at sleipa.

Hetta skuldi eisini fyrireikast, og tað var ikki bara sum at siga tað. Skipið lá uppankrað, og tað var ringt at koma framat tí brennandi skipinum fyri varma. Símun Askham, skipaði fyri, og hann var uttan iva tann rætti maðurin til hesa uppgávu.

Teir kom út við báti at brenna akkersketurnar av og at sjekla veirarnar í skipið til sleipið. Skiparin á Carolinu Thordén var umborð hjá okkum. Avbrendu akkersketurnar liggja vist enn á botni í Nólsoyarfirði.

Manningin var ikki umborð, so tað máttu í skundi útvegast manning, sum var tøk. Eg var so eisini við. Eingin kokkur var, so Esmar bað meg um at kokkast. Eg minnist, at ein av monnunum umborð hjá okkum var Grækaris Madsen úr Kvívík, sum var kendur sum ein ramligur sjálvstýrismaður. Synirnir hjá honum Thorstein og Arngrim vóru annars við Norðbúgvanum. Tað hevur ikki ligið fyri hjá teimum at koma við, og so er pápin komin í staðin.

Tá ið vit eru komnir norður um Staksoyruna seta vit fulla ferð á maskinuna og stýrdu inn móti landi nakað sunnan fyri kajuna, sum nú er. Vit slakkaðu av, og lótu Carolinu renna seg fram í sandin. Hetta gekk heilt væl.

Tað brendi framvegis, og nú var eftir at basa eldinum. Hetta var eisini uppgávan hjá askham-smiðjum við Símuni á odda. Símun var giftur við Onnu, sum gjørdist 104 ára gomul, og hvørs lívssøga eisini hevur verið í FF-blaðnum. Tað kann verða nevnt, at smiðjan hjá teimum var har, sum Gourmet og Glitnir eru nú.

Teir fingu Carolinu Thordén at halla so mikið, at hon drakk sjógv fyri at lætta um sløkkingina. Tá byrjaði sløkkingararbeiðið, men tað gingu fleiri dagar, til eldurin var køvdur. Tíverri rann olja úr skipunum og dálkaði illa.

P/f Uvak og p/f Kimbil, sum áttu trolararnar, høvdu lagt kr. 10.000 á til hvønn trolara, um royndin ikki eydnaðist. Eydnaðist hon, skuldi gjaldið vera tað dupulta, og tað fingu skipini eisini. Hetta gav eisini manningini ein fittan part.

Carolina Thorden lá her eina tíð og varð síðan vist sleipað til Bretlands.

## Samanstoytur

Eg havi eina ferð verið við til ein samanstoyt. Hetta var, tá ið Esmar var skipari við Norðbúgvanum og var á brúnni. Vit arbeiddi á dekkinum, og Esmar var vist durvaður. Vit rendu inn í síðuna á einum av teimum ensku trolarunum, sum fiskaðu undir Íslandi. Hetta var á Eysturlandinum. Hol kom á trolaran, men tó omanfyri vatngangin, so vandi var ikki fyri, at hann fór at søkka. Skiparin á enska trolaranum var sjálvsagt í øðini, Esmar kundi einki siga, tí hann hevði skuldina. Enski skiparin vildi hava Norðbúgvan at fylgja teimum inn á Seyðisfjørðin. Tað var gamaní, segði Esmar. Men hann fór ongan veg, fyrr enn hann hevði havt morgunhálið, sum ofta var tað besta til fisk! Teir fara so inn á Seyðisfjørðin. Her varð skjótt atborið. Smiðir komu umborð við plátum at tetta holið. Tað varð hildið sjóforhoyr. Og nú vóru báðir skipararnir so fyrndar blíðir, og Esmar bjóðaði sínum starvsbróðuri umborð, áðenn báðir fóru út aftur uttan at hava mist tað stóra.



*Vitjan á Sundi. F.v. Gugga, systir Jakku við Torbjørn, Jóhanna Apol, Eiko Apol, Ruth, kona Eiko, og Jákup Apol*



*Báturin hjá Gustav, Helena, við lítla báti at rógva í land við*

## Nógv kol

Tað bleiv altíð pressað við fullari ferð, tá ið siglt var millum lond, og hann kláraði 10 míl. Brennievnið hjá skipinum var kol, og undir sigling brúkti hann 10 tons um samdøgrið. Hetta var øgiliga strævið hjá fýrbøtarunum, onkuntíð tók eg eina vakt fyri at hjálpa teimum.

Tá ið siglt varð, máttu vit altíð hava útkikk eftir minum. Vit sóu eisini nógvar fara framvið, uttan at tær gjørdu skaða. Um náttina varð siglt, uttan at lanternurnar vóru tendraðar. Hóast tað stórt sæð var ómøguligt at síggja minur í myrkri, hildu vit kortini útkikk.

Kolið var virðismikið. Einaferð minnist eg, at Hans Pauli veddaði við ein av manningini um okkurt, sum teir vóru ósamdir um. Hans Pauli lovaði viðkomandi eitt tons av koli, um hann hevði rætt. Tað hevði hann eisini, hann fekk kolið og gjørdi kvetti.

## Mistu bjargingarbátin

Hans Pauli greiðir frá í sín bók Jól á Halanum frá fyrsta túrinum, hann var við Norðbúgvanum. Hetta var í oktober 1942, vit fóru av Vestmanna móti kvøldi í ruskveðri. Annar báturin hekk í davidunum við síðuna. Vit fingu ein skvamp, og báturin hvarv. Ein kappi reyk eisini saman við øðrum leysum á dekkinum. Farið var inn á Seyðisfjørðim í Íslandi at keypa ein nýggjan bát. Vit fóru út á Glettingarnes, um 20-30 fjórðingar úr landi at fiska. Skálaberg við gamla Mortan í Hvannasundi sum skipara var á somu leið. Tað var ikki loyvt at samskifta í telefonini, tí hon var bert til neyðarbrúk. Teir kundu geva boð millum sín við floytuni. Komu teir nóg nær, kundu teir rópa millum sín.

Hendan fyrsta túrin hjá Hans Paula varð landað í Fleetwood, har tað stóð eitt nýtt spæl vit skuldu hava um borð. Vit seldu hendan túrin fyri 12.000 pund. Fyri ein slíkan túr fekk manningini 2-3.000 krónur, og var hetta frálík inntøka fyri teir 14 dagarnar, ein slíkur túrur vardi.

## Tóku ís av Leitisvatni

Vit tóku ofta ís niðri, tað var ikki nóg mikið av framleiðsluorku at gera ís í Føroyum. Men viðhvørt tóku vit ís í Føroyum, og eina ferð var tað í Sørvági. Tá høvdu teir samlað ís av Leitisvatni. Stóri Martin á Vatnsoyrum hjálpti til at knúsa ísin. Tað mundu vera eini 30 tons av ísi vit fingu. Tað varð ísað so lítið tá, tí túrirnir vóru so skjótir. Hetta gjørdist ein av teimum skjótu túrunum. Eg haldi, at tað gingu sjey dagar frá tí, vit fóru av Sørvági og inntil, vit vóru aftur á Havnini við fullari last.

Tað vanliga var at fiska eina viku og onkuntíð 4-5 dagar. Tað var so stutt at sigla yvir



*Carolina Thordén liggur brennandi í Nólsoyarfirði. Jakku var við at sleipa skipið norður til Hvalvíkar, har eldurin var bastur*